

Jóannes Eidesgaard
*landsstýrismaður í fíggjarmálum*

# Búskaparfrøðingar ráðgeva í hvør sína ætt

*Seinastu dagarnar hava tveir av fremstu búskaparfrøðingum landsins, stjórin í Landsbankanum og stjórin á Hagstovuni, verið frammi við teirra metingum av framtíðini. Tað er ikki at taka munnin ov fullan at siga, at hesir tosa hvør sítt mál - ein í eyst og hin í vest. Eingin sigur, at teir skulu vera heilt samdir, men tað skal valdast, hvussu langt frá hvørjum øðrum, teir kunnu liggja. Stakkals vit, sum skulu brúka teirra ráðgeving til nakað skilagott*

Skulu vit gera myndina uppaftur fløktari, so kunnu vit eisini taka aðrar búskaparfrøðingar við, sum hava úttalað seg. Ein, sum situr í Løgtinginum og ofta er at hoyra í fjølmiðlunum um búskap, hevur brúkt alla sína orku uppá at mála eina ávísan upp á veggin, og at vit fara við fullari ferð út av eggjuni. Onkur annar, sum eisini hevur sitið í fremsta ráðgevingarsessinum hjá landsstýrinum, bað okkum hava ís í búkinum og heldur tøma landskassan enn at standa á bremsuni, tí tað vildi bara gera kreppuna enn verri.

Men aftur til Landsbankan og Hagstovuna. Lat meg taka nøkur dømi fram um tað, sum sagt er seinasta mánaðan ella gott tað:

**3. mars** sigur Sigurð Poulsen (SP), at Landsbankin metur ein búskaprvøkstur fram til 2015 uppá 4% árliga í leypandi prísum ella 2% í føstum prísum. Dagin eftir sigur Hermann Oskarsson (HO), at miðal vøksturin seinastu 10 árini hevur verið 4,5%. Víðari sigur hann, at tað er ongin grund til at halda, at vøksturin verður minni fram til 2015, men í 2010 verður eingin vøkstur.

**8. mars** kemur Búskaparráðið við síni frágreiðing, og tá henda byggir á Landsbankans metingar, so eru teirra metingar tær somu sum hjá SP.

**Ein mánaða seinni 8. apríl** sigur Landsbankin á heimasíðu síni, at 25 ára miðalvøksturin hesi seinast 10 árini hevur verið millum 1 og 2 % um árið, men 25 ára miðaltalið fyri vøkstur er minkandi hesi seinastu árini.

Men sum um hetta ikki var nóg mikið, so fer SP nú út sum ein dómadagsprofetur og sigur m.a.:

- Skuldin veksur alt ov skjótt
- Uppskotið hjá landsstýrinum er ov lítið ambitiøst
- Vit klára eina skuld uppá 45 % av BTÚ, men váðin gerst alt ov stórur
- Milt sagt ikki klókt at bera seg soleiðis at
- Fyri hann ikki avgerandi, um talan verður um sparing ella meir inntøkur
- Veljarin má gera vart við seg og tvinga politikararnar
- Ringt, at vit byrgja okkum inn í eina fellu, sum vit ikki klára at arbeiða okkum úr aftur

**Men so kemur HO** um júst somu tíð bara eina tíðindasending seinni og slær fast:

- Hetta er git, sum við heilt stórari vissu er skeiv
- Onkur situr við einum rokniarki og gitur út frá fortreytum, hann sjálvur setur
- Havi lítla respekt fyri tílíkum
- Git sum er verri enn einki
- Í Fraklandi er 15 stór búskaparmodel sum 2000 fólk umsita
- Sikkurt skeivt
- Ópassandi samstarv millum bureaukratar og politikkarar
- Forsiktigheitssenarium sum nakrir skuldarfelluhysterikarar hava stilla upp

**Men fyri líka sum at seta prikkin yvir i´ið,** so kemur HO út aftur sama dag í einari seinni tíðindasending og slær fast:

- Stórt uppsving krógvar seg beint fyri framman
- Treytin er, at vit uppføra okkum fornuftigt
- Ordiligur brestur av einum upptúri
- Toskaprísurin í dag 4 ferð minni, enn hann eigur at vera
- Ikki naivt optimistiskur. Hetta er innan fyri mítt fak

**Eri faktisk sera glaður fyri, at inni í Fíggjarmálaráðnum eru fakfólk, sum ikki fara í flog ella grava seg niður. Fólk við beinunum á jørðini**

### Skuldarfelluhysterikari ella óambitøsur

Í síni ætlan fyri árini fram til 2015 hevur landsstýrið sett upp tey tiltøk, landsstýrið ætlar at fremja. Hetta eru ikki git.

Í síni ætlan hevur landsstýrið eisini gjørt útreiðsluframskrivingar fram til 2015. Hetta eru útreiðslur, vit vita koma. Sum dømi kunnu nevnast: ellis-og røktarheim, ið eru í gerð, øking í læraraeftirlønum, øking í fólkapensión orsakað av at talið av pensionistum økist og størri tilgongdum í okkara skúlaverki. Her er talan heldur ikki um git.

Grundað á upplýsingum frá búskaparfrøðini hevur landsstýrið gjørt eina realistiska, kanska eitt lítið sindur varisliga meting av búskaparvøkstrinum fram til 2015. Metingin er, í hvussu so er, klárt omanfyri miðalvøksturin seinatu 25 árini.

Landsstýrið hevur í uppskotinum sett sær fyri at gera tiltøk í 2011, ið eru munandi størri enn tað Búskaparráðið og Landsbankin mæla til, sjálvt um SP nú sigur, at tey eru ov lítið ambitiøs.

**PS:** Ikki er tað lætt at siga, um vit eru skuldarfellu-hysterikarar, sum Hermann Oskarsson vil gera okkum til, ella um vit eru ov lítið ambitiøs, sum Sigurð Poulsen vil gera okkum til. Eri faktisk sera glaður fyri, at inni í Fíggjarmálaráðnum eru fakfólk, sum ikki fara í flog ella grava seg niður. Fólk við beinunum á jørðini.



Zakarias Wang

# Nevndar-ábyrgd

*Á sjútiáradegnum fyri bretsku hersetingina av Føroyum hevði Landsverk framløgu av úrslitunum av teimum veðurfrøðiligu kanningum, sum teir hava gjørt av hvar best er at gera ein altjóða flogvøll í Føroyum*

Úrslitið er fullkomuliga greitt.

Veðurfrøðiliga sæð er Kirkjubøur besta stað, vit kunnu fáa í Føroyum til flogvøll.

Harumframt er tað eisini bert her, ein flogvøllur kann gerast, sum er so mikið langur og breiður, at hann kann nýtast av øllum heimsins flogførum.

Landsverk er ein almennur myndugleiki, og tað hesin stovnur sigur, er av allarstørsta týdningi, tá avgerðir skulu takast.

Tíbetur er einki, ið forðar fyri, at tey ráð, Landsverk her gevur, verða fylgd.

Jarðareigarin er Føroya Jarðarráð, og tað er bert ein formligur spurningur at fáa jørðina til eitt so gott endamál sum hetta.

Tann myndugleiki, sum fæst við flogvøllin í Føroyum er eitt partafelag, sum hevur navnið Vága Floghavn.

Nevndin í hesum felag hevur sjálvandi sum allar aðrar partafelagsnevndir skyldu til at taka tær røttu avgerðirnar í einum og hvørjum føri.

Higartil hevur ivi verið um, hvørt tað er rætt at gera flogvøll Føroya aðra staðni enn í Sørvági. Tí hevur nevndin í hesum felag gjørt sáttmála við eina fyritøku um at leingja verandi flogvøll.

Men nú vísir tað seg, at grundarlagið fyri avgerðini er skeivt. Partafelagið fær ov lítið burtur úr íløguni, sum talan er um at gera, og tí er bert ein leið, og tað er at broyta avgerðina um at útbyggja á skeivum stað.

Tað hevur verið ført fram, at tann umhugsaða útbyggingin er bíligari enn tann rætta loysnin.

Landsverk vísir á, at ein flogvøllur í Kirkjubø kostar 900 milliónir. Hetta var ein meting í 2006, tá allir prísir vóru nógv hægri enn í dag. Tann áhugaverdi spurningurin nú er: Hvat kann byggifyritøkan, sum vil byggja út í Sørvági fyri 132 milliónir, gera ein samsvarandi 1799 metra vøll í Kirkjubø fyri? So skal meirupphæddin fáast til vega, og tað verður ikki torført, tí tað er altíð lættari at fíggja eina góða verkætlan enn eina sum almennir myndugleikar siga vera verri.

**Tíbetur er einki, ið forðar fyri, at tey ráð, Landsverk her gevur, verða fylgd.**

At taka slíkar avgerðir er nakað sum nevndir í partafeløgum hava skyldu til, og neyvan er nøkur orsøk til at halda, at nevndarlimirnir fara at sníkja seg undan síni ábyrgd.